# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

**Svarari:** Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

**Evni:** Lands- og PISAroyndir í fólkaskúlanum

**Spurningar:**

1. Hvat er kostnaðurin av at hava lands- og PISAroyndir í fólkaskúlanum?
2. Hvussu verða úrslitini av royndunum brúkt?
3. Metir landsstýrismaðurin, at úrslitini av lands- og PISAroyndunum verða brúkt til frama fyri næmingin?
4. Hvørjar afturmeldingar hava starvsfólkini, sum virka í skúlunum, givið um lands- og PISAroyndirnar?
5. Hvørjar eru ætlanirnar við lands- og PISAroyndunum í framtíðini?

**Viðmerkingar:**
PISA er ein OECD-verkætlan, ið miðar eftir at máta, hvussu væl 15 ára gomul eru fyrireikað at møta framtíðar avbjóðingum og at duga at nýta førleikar sínar í veruliga lívinum. Soleiðis stendur at lesa á heimasíðuni hjá Námi.

Endamálið við landsroyndunum er at geva skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í úrtøkuna hjá næmingum í 4. og 6. flokki í fólkaskúlanum í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni.

Men samstundis er veruleikin, at nógv av okkara børnum hava avbjóðingar við sálarheilsuni. Orsøkin kann vera, at stór krøv verða sett til børnini, m.a. í sambandi við landsroyndir og PISA royndir. Spurningurin er tí, um vit brúka pengarnar rætt, og um úrslitini gagna næmingunum.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

**Á Løgtingi, 5. august 2022**

Jóhannis Joensen